Álit

í

løgtingsmáli nr. 87/2020: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 18. februar 2021, og eftir 1. viðgerð tann 2. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. og 23. mars, 6. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Handverksmeistarafelag, Install, Leif Mohr, Maskinmeistarafelagið, SEV og Helga Abrahamsen, landsstýrismann í umhvørvis- og vinnumálum.

Talan er um eina dagføring og nútímansgerð av tekniskum reglum kring elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Lógin kemur í staðin fyri galdandi Sterkstreymslóg (løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað). Lógin skipar eitt øki, sum í stóran mun er merkt av tekniskari menning og altjóða samstarvi. Nýggja lógin tekur tí í størri mun støði í evropiskum og altjóða standardum.

Uppskotið er í høvuðsheitum hitt sama, sum løgtingsmál nr. 94/2019, sum lagt varð fyri Løgtingið á vári 2019, men sum fall burtur. Málið er viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 86/2020, ið er uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum.

Vinnunevndin er av teirri áskoðan, at verandi skipan, har SEV er góðkenningarmyndugleiki viðvíkjandi nýggjum el-innleggingum, virkar væl. Nevndin mælir til, at hildið verið áfram við verandi skipan.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 26. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	